


*Tann tíðin er við at vera farin, tá ið Fólkaflokkurin bara tosaði um vinnulív og búskap. Nú skulu sosialmálini fylla meiri, segði Jørgen Niclasen, formaður fyri fólkaflokkin á tingi*

# Fólkaflokkurin skal pynta sosiala andlitið

**Fólkaflokkurin mest vanur at tosa um vinnulív og búskap, men nú skal hann eisini hava eitt sosialt andlit. Men hann skal hava ein sosialpolitikk, sum veruliga ber framá**

POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit vilja ikki hava pensjónir. Vit vilja hava møguleikar!

Hetta verður eitt av herrópunum, sum Fólkaflokkurin fer at seta í sítt skjaldrarmerki, nú tey so smátt eru farin at fyrireika seg til valstríð til næsta løgtingsval.

Tað er bara eitt ár til næsta Løgtingsval og á Landsfundinum hjá Fòlkaflokkinum í Øravík farna vikuskifti vóru teir fyrstu spírarnir lagdir, sum skal tryggja flokkinum eitt gott val.

Og Jørgen Niclasen, formaður fyri tingmanningina hjá Fólkaflokkinum vísti á, at tann tíðin er við at vera farin, tá ið Fólkaflokkurin bara tosaði um vinnulív og búskap.

Og tann gongdin skal vendast enn meiri, tí nú skal flokkurin eisini hava eitt sosialt andlit.

Og fer flokkurin at byggja á eina útsøgn frá forkvinnuni í Javna, sum einaferð hevði hartað politikarar fyri at elska pensjónir.

– Vit vilja ikki hava pensjónir. Vit vilja hava møguleikar, segði forkvinnan í Javna og hetta verður eisini grundarlagið undir okkara sosialpolitikki, segði Jørgen Niclasen.

– Vit skulu hava ein sosialpolitikk, sum veruliga ber framá.

Hann vísti eisini á, at ein kanning vísti, at pensjónirnar vóru tað, sum fólk við skerdum førleika, vóru frægast nøgd við.

Hinvegin vóru tey ikki nøgd við teir møguleikar, tey høvdu á arbeiðsmarknaðinum.

– Sjálvt hjá almennum stovnum er tað torført at seta fólk við skerdum førleika í starv og tað kann ikki vera rætt.

– Sum støðan er nú, er tað eitt krav, at tey, sum eru best skikkað til eitt starv í almennu umsitingini, skulu fáa tað. Fáa onnur enn tey best skikkaðu eitt starv, kemur Løgtingsins Umboðsmaður upp í leikin og átalar starvssetanina.

Jørgen Niclasen segði, at tí er tað logikkur, at tá ið eitt alment starv skal setast, verða tey við skerdum førleika ikki mett at vera best skikkað og verða sostatt sáldað frá.

– Hendan mannagongd førir við sær, at vit hava ein stóran skara av fólki, sum heldur enn fegin vilja sleppa til arbeiðis og sum heldur enn fegin vilja vera við til at lyfta byrðar í samfelagnum.

– Men samfelagið vil heldur senda teimum pensjón og vil ikki loyva øllum hesum kreftum til arbeiðis.

Tí fegnaðist hann um, at ein samd trivnaðarnevnd hjá Løgtinginum, við umboðum úr øllum flokkum á Løgtingi, uttan sjálvstýrisflokkinum, mælir til at styrkja tann partin í Almannastovuni, sum hevur við arbeiðsávísing at gera.

Hetta skal tryggja, at vit fáa fleiri vard størv.

Hann fegnaðist eisini um, at ein samd trivnaðarnevnd mælir eisini landsstýrinum til at krevja, at allir almennir stovnar, sum eru størri enn eitt vist, skulu hava eitt ávíst tal av fólki við skerdum førleika í starv.

Fyri at styrkja støðuna hjá førleikaskerdum, heldur trivnaðarnevndin eisini, at atlit skulu takast fyri fólkum við skerdum førleika í setanar- og uppsagnarpolitikkinum hjá tí almenna.

– Vit halda eisini, at umstøðurnar hjá fyritíðarpensjónistum eiga at broytast, so at tað loysir seg hjá teimum at arbeiða. Sum støðan er nú, missir ein fyritíðarpensjónistur 60 krónur av pensjónini, hvørja ferð hann forvinnur 100 krónur í lønandi arbeiði, umramt skattin. Sostatt fáa tey lítið og onki burturúr at arbeiða og í summum førum fáa tey minni at liva fyri, tá ið tey arbeiða, so nógv verður tikið í skatti og mistari pensjón.

– Tí hevur trivnaðarnevndin hjá Løgtinginum mælt til, at pensjónin skal bara skerjast 30 krónur fyri hvørjar 100 krónur, ein fyritíðarpensjónistur forvinnur.

Jørgen Niclasen sigur, at støðan er tann sama hjá fólkapensjónistum og hjá útróðrarmonnum, sum fáa minstaforvinning.

## Pengarnir fylgja pensjónistunum

Annars vísti Jørgen Niclasen á, at samgongan í løtuni arbeiðir við rættiligagrundlegjandi broytingum í pensjónsviðurskiftunum hjá pensjónistum.

– Í dag er støðan tann, at tá ið pensjónistur flytir inn á ellis-og røktarheim, missa tey pensjónina, men fáa nakrar krónur um mánaðin til lummapening.

– Hetta er ikki virðiligt og tí arbeiða vit við eini skipan, har pensjónin fylgir pensjónistunum. T að merkir, at verður pensjónistur lagdur inn á ellis-og røktarheim, skal hann varðveita pensjónina, men skal so sjálvir gjalda tað, sum tað kostar.

Hann helt, at einasta rætta var at gera tað sama fyri børnini, so at pengarnir altíð fylgdi børnunum. Tað merkir, at foreldrini kundu sjálvi gera av, um tey høvdu børnini á ansingarstovni, ella um tey ansaðu børnunum heima og fingu ansingargjaldið útgoldið.

– So hevði tað ikki verið samfelagið, sum tók avgerðina fyri foreldrini, men foreldrini sjálvi, segði Jørgen Niclasen.

Hann vísti á, at Sambandsflokkurin vísti ikki tankanum frá sær, men Javnaðarflokkurin var hvørki til at høgga ella stinga í.

Annika Olsen helt ikki, at tað var nøkur loysn at eggja øðrum foreldrunum til at vera heima, tí tað var fáa staðni at tað bar til, tí flestu húski í dag hava brúk fyri tveimum inntøkum.

Men har tað ber til, hevur hon onki ímóti at peningur fylgir barninum, so at foreldur ansa sínum egnum børnum og fáa ansingargjaldið fyri tað.

# Størri sjálvræði til kommunur verður stóra málið í valstríðnum

**Uppgávubýtið ímillum Landið og kommunurnar verður eitt høvuðsmál í valstríðnum til næsta løgtingsval**

VALSTRÍÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hvørji mál skal Landið umsita og hvørji mál skulu leggjast undir kommunurnar at umsita.

Hetta verður ein av teimum stóru spurningunum í valstríðnum upp undir næsta Løgtingsval.

Tað meta í hvussu so er oddamenninir í Fólkaflokkinum.

Á Landsfundinum í Øravík, farna vikuskiftið, vísti Jørgen Niclasen á, at ósemja er í samgonguni um, hvørji mál skulu leggjast undir kommunurnar at umsita og, hvørji mál skulu liggja eftir hjá landinum.

– Fyri Fólkaflokkin er ongin ivi um, at vit eiga at leggja fleiri og fleiri málsøki undir kommunurnar at umsita.

Í hesum sambandi er fólkaskúlin nevndur, men onnur hava eisini nevnt eldraøkið.

– Stóri fyrimunurin við at leggja málsøki undir kommunurnar at umsita, er, at viðurskifti, sum hava við borgaran at gera, verða viðgjørd og umsitin úti í økinum, har borgarin býr.

Fólkaflokkurin ivast ikki í, at hetta fer at gera umsitingina nógv betri, tí hon er nærri borgarunum.

Leggja vit fleiri málsøki undir kommunurnar at umsita, er tað ein gyltur møguleiki at fáa almennar stovnar fluttar úr Havnini, so at suðuroyingar kunnu umsitast úr Suðuroy og ikki úr Havnini.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, ivaðist ikki í, at í framtíðini verður tann, at ábyrgdin fyri ølkum skúlaverkinum verður løgd undir kommunurnar at umsita og at landið bara kemur at sita eftir við ábyrgdini fyri tí yvirskipaða lógarverkinum.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum helt, at tað hevði avgerðandi týdning at fáa eitt greitt ábyrgdarbýtið ímillum land og kommunur.

Men hann helt eisini, at tað verður gjørt við skili, tá ið mál verða løgd undir kommunurnar.

– Tað er lættari fyri borgaran, at avgerðirnar verða tiknar í nærumhvørvinum, helt hann og tí var hann heitur talsmaður fyri at leggja øki undir kommunurnar.

Hann sá tað eisini sum eitt økismenningartiltak, tí økt umsiting í nærumhvørvinum, merkir fleiri almenn størv úti um landið.

Annika Olsen tekur fult undir við, at kommunurnar fáa fleiri øki at umsita, so at avgerðir verða fluttar nærri borgarunum. Men hon helt, at tað er umráðandi, at peningur fylgir við.

Tí helt hon at tað var ov nógv at hava sjey kommunur. Tað rættari er kanska, at tað eru fýra- fimm kommunur, so at Tórshavnar Kommuna veruliga fær ein kappingarneyta, tí sum er, er Tórshavn helst tann einasta kommununa, sum er før fyri at átaka sær málsøki av týdningi at umsita og tað er ikki rættvíst.

## Taka frælsið frá smáum kommunum

Heðin Zachariasen er ikki samdur, tí hann helt, at smærri kommunur megnaðu eisini sína uppgávu. Hann vístu á, at í Sunda Kommunu vóru tríggir nýggir stovnar og smærri kommunur høvdu megnað betri enn tær størru at nøkta tørvin á barnaansing.

Men hann helt, at tað var umráðandi, at gongdin, sum er nú har landsskatturin lækkar og kommunuskatturin hækkar, kann ikki halda fram. Tað gevur eitt býtið ímillum økini, sum er alt ov ójavnt.

Hann var eisini ósamdur við Jacob Vestergaard, sum hevði býtt landið sundur í sjey ávís samstarvsøki.

– Tað tekur frælsið frá teimum smærri kommununum og avmarkar møguleikarnar hjá teimum at samráðast, tá ið tær ikki hava møguleika at samstarva meiri enn tann eina vegin.

Kortini harmaðist hann um, at kommunusamanlegging hevur ført við sær, at Havnin er vorðin enn størri og sostatt er tann minni vorðin enn minni ístaðin fyri at leggja soleiðis saman, at økini verða meiri javnt stór.

Heldur ikki Heðin Zachariasen ivaðist í, at ábyrgdarbýtið millum landið og kommunur verður ein partur í valstríðnum.